[Endurlýsing]

# Set tíni fingramerki á føroyska bygging

## Deildarleiðari til bygningadeildina á Landsverki

Vilt tú bjóða tær sjálvum av og seta varðar eftir teg við stórverkum og stásiligum bygningum, so letur Landsverk dyrnar upp fyri tær við einum spennandi og avbjóðandi starvi sum deildarleiðari á bygningadeildini.

**Høvuðsuppgávur**
Saman við dugnaligum starvsfeløgum verður tú við til at:

- greina og raðfesta nýbygging og viðlíkahald við atliti at funktionaliteti, estetikki og góðsku.
- góðkenna verkætlanir og taka støðu til møguligar broytingar, umframt viðgera onnur byggimál, har bygging, bygningar, lendi og formlist eru partur av viðgerðini.
- uppbyggja ein politikk fyri almenna byggilist.
- fyrireika og samskipa landsbyggireglugerð fyri Føroyar.
- menna eitt kreativt arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv**
Tú ert útbúgvin arkitektur, byggifrøðingur, verkfrøðingur ella líknandi. Leiðsluroyndir og aðrar royndir frá verkætlanum í byggivinnuni er ein fyrimunur. Vit leggja dent á dygd og góðar loysnir, og vørumerki títt er tískil dugnasemi og nærlagni, har tú sum arbeiðsfúsur viðleikari gevur títt íkast til arbeiðsplássið og ta røttu byggingina.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til lv@lv.fo ella til Landsverk, postsmoga 78, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. mars, 2008. Merk umsóknina „Deildarleiðari bygningadeildin" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á 540 801 ella ob@lv.fo.



SENDISTOVAN

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

www.sosialurin.fo

# Haldaragjald!!!

## Hava tit minst til at gjalda haldaragjaldið fyri apríl ársfjórðingin?

## Steðgidagur er 31. mars.

Sosialurin



# Móttøka

Í sambandi við at Sólrun Michelsen tann 11. mars 2008 fylti 60 ár, og at hon tann 1. apríl 2008 fer frá sum stjóri, bjóða vit samstarvsfeløgum, vinum og kenningum til móttøku í virkisbygningi okkara á Hoyvíksvegi 74

mikudagin 19. mars 2008
kl. 16.00 til 18.00.

P/F Poul Michelsen



Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin

# Bilførari

Søkt verður eftir bilførara at byrja skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja, ella støkka inn á gólvið og spyrja eftir Bent.

Grón
**Bakaríið Grón**
Tlf. 236214 ella 312161